**NIÐURSTØÐUR FRÁ ST HOYRING 20. OG 21. JUNI 2016**

Føroyar vóru til ST hoyring 20. og 21. juni í sambandi við sáttmálan um borgarlig og politisk rættindi, sum hevur verið í gildið fyri Føroyar síðani 1972.

Ein mannarættindanevnd mannað við 18 óheftum serfrøðingum stendur fyri eftirlitinum í sambandi við semingina um borgarlig og politisk rættindi.

Nevndin hevur gjørt sínar niðurstøður og Føroyar fáa bæði rís og rós frá nevndini.

Føroyar fáa rós fyri at hava sett í verk heildarætlanina um harðskap í parløgum og nærsambondum frá 2011, og fyri at hava tikið undir við sjálvbodna sáttmálaískoytinum til Breksáttmálan í 2014.

Nevndin vísir eisini á nøkur øki, sum tey meta krevja ábøtur. Víst verður á, at eingin mannarættindastovnur er í Føroyum, sum fremur óheft eftirlit. Nevndin mælir til, at slíkur stovnur verður skipaður í trá við París meginreglurnar.

Føroyar fáa somuleiðis viðmerking fyri ikki at hava nøktandi anti-diskrimitatións lóggávu, og nevndin mælir til, at slík verður sett í gildi fyri Føroyar.

Nevndin vísir eisini á vantandi javnstøðu í almenna og politiska rúminum í øllum kongsríkinum, og serliga í lokalum nevndum og ráðum í Føroyum (og Grønlandi). Nevndin heitir harafturat á almenna myndugleikan um at tryggja javnstøðu í nevndunum í teimum størstu smápartafeløgunum og í fyritøkum, sum verða riknar av tí almenna.

Nevndin saknar somuleiðis kunning um ítøkilig átøk til tess at basa lønarmunin millum menn og kvinnur.

Nevndin leggur afturat, at hon saknar hagtøl viðvíkjandi politifráboðanum um harðskap við hús, eftirfylgjandi kanningum, hvussu ofta ákæra verður reist og møguligum revsitiltøkum.

Niðurstøðurnar og tilmælini eru send víðari til avvarðandi myndugleika, í hesum førinum Lógartænastuna á Løgmansskrivstovuni (anti-diskriminatiónslóggáva) og Almannaráðið, sum fyrisitur javnstøðumál. Uttanríkis- og Vinnumálaráðið varðar av arbeiðinum við at kanna hvussu óheft eftirlit á mannarættindaøkinum kann verða framt.